# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Missur hann nú heilivágin, er bara rullistólurin eftir og so er bara eitt at gera og tað er at rýma av landinum*

*Ann Mikkelsen*

# Konsert við Lenu Anderssen í Miðvágs Kirkju



**Sunnudagin klokkan 17.00 verður forvitnislig konsert við Lenu Anderssen í Miðvágs kirkju. Hetta er fyrstu ferð, Lena hevur konsert í eini kirkju**

**TÓNLEIKUR**
*dagfinn@sosialurin.fo*

Í sambandi við, at Vestanstevna er komandi vikuskifti, verður ein forkunnug konsert í Miðvágs kirkju sunnudagin, har føroyski songfuglurin Lena Anderssen fer at framføra. Lena hevði fyri tveimum vikum síðani sína fyrstu almennu konsert í Føroyum í ár, tá hon spældi fyri útseldum Sjónleikarhúsi. Hetta er tó fyrstu ferð, Lena hevur konsert við egnum tilfari í eini kirkju.

Eg havi ongantíð havt egna konsert í eini kirkju, so tað er ein heiður fyri meg at vera boðin til Miðvágs at hava konsert har. Eisini ljóðar tað spennandi, tí kirkjan er kend fyri sín góða akkustik, so eg vóni, vit øll fara at hava eina góða løtu har sunnudagin, sigur Lena.

Føroyska songkvinnan er júst komin til Føroya frá konsertum í Írlandi og Danmark. Í Danmark var Lena serligur gestur hjá kanadiska ambassadørinum í Keypmannahavn, ið hevði boðið Lenu at syngja til hennara fráfaringar samkomu, har sendiboð fyri lond kring allan heim og aðrir innbodnir gestir komu á gátt og lurtaðu. Konsertin sunnudagin er ókeypis.

*Lena Andersen fer fyri fyrstu ferð at hava kirkjukonsert, og verður hendan í Miðvágs kirkju*

www.sosialurin.fo Leys størv á Sosialinum




## Bókhaldari

**Ein fyritøka í vøkstri krevur eisini vøkstur í umsitingini.**

Tí søkja vit nú eftir fólki at arbeiða í bókhaldi okkara hálva tíð. Framman undan eru trý fólk í starvi í bókahdlinum.

Starvið fevnir um alt vanligt bókhaldsarbeiði, herundir bókingar av inntøkum og útreiðslum, avstemmanir og debetor- og kreditorrøkt.

Vit kunnu bjóða tær eitt avbjóðandi starv í einum spennandi umhvørvi í eini fyritøku, sum er í støðugari menning, og sum í dag virkar á fleiri miðlapallum. Og vit ímynda okkum, at tú ert til reiðar at byrja í nýggja starvinum í seinasta lagi 1. september – men um møguligt gjarna fyri hetta.

Er áhugi at frætta meira um starvið, ber sjálvandi til at ringja til okkara á telefon 341800 og tosa við Jákup Mørk ella Johonnu Vang. Sjálvandi ber eisini til at senda teldubræv til jakup@sosialurin.fo ella til johanna@sosialurin.fo

Umsóknir við viðkomandi upplýsingum eiga í seinasta lagi tann 20. juli at verða sendar til

Sosialurin
Postsmoga 76
FO-110 Tórshavn

*Sosialurin hevur vaksið um virksemi frá at verða eitt tíðindablað , til at verða størsta fjølmiðlafyritøkan í landinum. Fyritøkan umfatar Sosialin, Rás2, S-lýsingar, Portalurin, Sportal, Planet.fo, Rás1 og Miðlahúsið. Tilsamans starvast í dag umleið 45 starvsfólk í fyritøkuni.*

# Futt avdúkar bólkar




**Futt er farið undir at avdúka nøvnini, ið spæla á ólavsøkukonsertini í Tórsgøtu tann 25. juli. Eager to Please og Bet you are William eru nú komin afturat á listan til Futt í Býin**

**TÓNLEIKUR**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Endurstovnaða Futt avdúkaði í síðstu viku, at ólavsøku konsert verður undir betri og broyttum umstøðum í Tórsgøtu tann 25. juli. Lena og Niclas komu tá eisini á plakatina, men meira varð ikki avdúkað. Men í dag avdúkar Futt so tvey nøvn afturat, nevniliga Eager to Please og Bet you are William.

Dagfinn Joensen (Sang og Guitar), Bjarti Dalheim (Lead Guitar), Heri Reynheim (Bass), Rani H. Christiansen (Trummur) stovnaðu Eager To Please í 2005. Umframt hesar, so er Høgni Fagraberg (guitar, kór) eisini við

Stutt kann sigast, at allir hava royndir úr øðrum bólkum, so sum Diatribes, Fluffy Toys og mongum øðrum bólkum. Bólkurin legði seg eftir at spæla at spæla feitan rock av tí góða gamla slagnum við sterkum íblástri frá eittnú; Whitesnake, Deep Purple, Led Zeppelin, Status Quo, Black Sabbath, Scorpions o.s.fr. Bólkurin og limirnir hava áralangar royndir og hava tikið lut í mongum vási. Fyri stuttum gav bólkurin eisini út fløgu. Eager to Please siga seg væntandi hava ein gestatónlekara við á konsertii 25. juli.

## Bet you are William

Hetta er listanavn hjá Petur Háberg. Petur eitur William til millumnavn eins og abbin. Og út frá Petur William kom so Bet You Are William (Pet – u – r William). Í juli kemur fyrsta fløgan út, ið hevur heitið See Innlaid Heart for Details. Fyrsta ingleútgávan av útgávuni kemur í dag, og eitur Here We Go, Stereo.

Í 2005 gjørdist Petur nummar tvey í Singer/songwriterkappingini á Hafnia. Í 2006 stovnaði hann bólk fyri at royna sangirnar í hesum høpi. Petur luttók við bólki á fleiri festivalum í fjør. Hann skrivaði undir kontrakt við nýggja plátufelagið Rock Pipit Records og fór í upptøkuhølini, og nú er fløgan, sum Óli Poulsen hevur ljóðblandað, klár.

Bólkur: Hanus Mikal Andreassen: ljómborð, Bartal Augustinussen: el-gittar, Eyðun Johannesen: bass, Andreas Dalsgaard: trummur, Petur Háberg: sang, kassagittar og el-gittara. Á fløguni er Hans Poulsen eisini við á ljómborð, onkrar bassar, onkrar gittarar, kórútseting og alt møguligt annað!